## Hús á Tinghúsvegnum



Um hóskandi boð fæst, verður sethúsaognin Tinghúsvegur 38, 100 Tórshavn seld.

Húsini eru í 3 hæddum á 56m² hvør.

Miðhædd: Gongd, køkur, spísikamar, tvær stovur, kamar og hjallur.
Loft: Gongd, fýra kømur, klædnarúm og baðirúm. Loftið hevur trimpul.
Kjallari: Er sundurskildraður í vaskirúm og trý goymslurúm.

Grundøkið e 342 $m^2$.

Ognin liggur væl fyri, mitt í býnum, friðarligt og við góðum útsýni.

Nærri upplýsingar um ognina fáast frá

**Advokatskrivstovan**
Fr. Petersensgøtu 9
100 Tórshavn · Tlf. 311145
att.: Fríða Patursson, adv.
frp@jura.fo


# Almenn móttøka fyri Katrini Olsen

**HM-silvurið, sum Katrin Olsen vann í Japan, skal heiðrast væl og virðiliga, tá róðrarkvinnan kemur til Føroya**

MÓTTØKA
*tíðindaskriv*

Í sambandi við at Katrin Olsen hevur verið við til at vinna silvurmerki í HM-róðri fyri dupultfýrara, skipar barndómsfelagið hjá Katrini, Róðrarfelagið Knørrur í Havn, fyri almennari móttøku til tess at heiðra hana fyri hetta megnar avrik.

Móttøkan verður fríggjadagin 9. september, kl. 18:00 í neystinum hjá Róðrarfelagnum Knørri, yvir av timburhandlinum hjá Valdemari Lützen.

Á skránni verður horntónleikur, felagssangur, røður og gávuhandan. Tey, sum fara at halda røðu, verða Jógvan á Lakjuni, mentamálaráðharri, Jógvan Arge, varaborgarstjóri, Jan Herman Hansen, næstformaður í Róðrarsambandinum, og Jannie Dam Jacobsen, forkvinna í Róðrarfelagnum Knørri.

Aftaná verður smurt breyð og leskidrykkur at fáa í neystinum hjá felagnum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**HM-undankappingin 2006**

**Bólkur 1**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Holland | 10 | 9 - 1 - 0 | 25 | 3 | 22 | 28 |
| 2 Kekkia | 10 | 8 - 0 - 2 | 32 | 10 | 22 | 24 |
| 3 Rumenia | 11 | 7 - 1 - 3 | 19 | 10 | 9 | 22 |
| 4 Finnland | 10 | 5 - 1 - 4 | 21 | 15 | 6 | 16 |
| 5 Makedonia | 11 | 2 - 2 - 7 | 11 | 24 | -13 | 8 |
| 6 Andorra | 11 | 1 - 2 - 8 | 4 | 31 | -27 | 5 |
| 7 Armenia | 11 | 1 - 1 - 9 | 6 | 25 | -19 | 4 |

**Bólkur 2**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Ukraina | 11 | 7 - 3 - 1 | 16 | 5 | 11 | 24 |
| 2 Turkaland | 11 | 5 - 5 - 1 | 22 | 9 | 13 | 20 |
| 3 Grikkaland | 10 | 5 - 3 - 2 | 14 | 8 | 6 | 18 |
| 4 Danmark | 10 | 4 - 4 - 2 | 21 | 11 | 10 | 16 |
| 5 Albania | 10 | 4 - 0 - 6 | 9 | 17 | -8 | 12 |
| 6 Georgia | 10 | 2 - 3 - 5 | 14 | 24 | -10 | 9 |
| 7 Kasakhstan | 10 | 0 - 0 - 10 | 5 | 27 | -22 | 0 |

**Bólkur 3**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Portugal | 10 | 7 - 3 - 0 | 30 | 4 | 26 | 24 |
| 2 Slovakia | 10 | 5 - 4 - 1 | 23 | 8 | 15 | 19 |
| 3 Russland | 10 | 5 - 4 - 1 | 18 | 11 | 7 | 19 |
| 4 Letland | 11 | 4 - 3 - 4 | 18 | 18 | 0 | 15 |
| 5 Estland | 10 | 4 - 2 - 4 | 14 | 16 | -2 | 14 |
| 6 Liektenstein | 11 | 2 - 2 - 7 | 12 | 21 | -9 | 8 |
| 7 Luksemburg | 10 | 0 - 0 - 10 | 4 | 41 | -37 | 0 |

**Bólkur 4**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Sveis | 8 | 4 - 4 - 0 | 17 | 6 | 11 | 16 |
| 2 Frakland | 8 | 4 - 4 - 0 | 9 | 1 | 8 | 16 |
| 3 Ísrael | 9 | 3 - 6 - 0 | 13 | 9 | 4 | 15 |
| 4 Írland | 8 | 3 - 4 - 1 | 11 | 5 | 6 | 13 |
| 5 Cypros | 8 | 1 - 1 - 6 | 8 | 15 | -7 | 4 |
| 6 Føroyar | 9 | 0 - 1 - 8 | 3 | 25 | -22 | 1 |

**Bólkur 5**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Italia | 8 | 5 - 2 - 1 | 14 | 7 | 7 | 17 |
| 2 Noreg | 8 | 3 - 3 - 2 | 10 | 7 | 3 | 12 |
| 3 Slovenia | 8 | 3 - 3 - 2 | 10 | 9 | 1 | 12 |
| 4 Skotland | 8 | 2 - 4 - 2 | 6 | 6 | 0 | 10 |
| 5 Hvítarussland | 8 | 1 - 4 - 3 | 11 | 13 | -2 | 7 |
| 6 Moldova | 8 | 1 - 2 - 5 | 4 | 13 | -9 | 5 |

**Bólkur 6**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Póland | 9 | 8 - 0 - 1 | 26 | 7 | 19 | 24 |
| 2 Ongland | 8 | 6 - 1 - 1 | 14 | 4 | 10 | 19 |
| 3 Eysturríki | 8 | 3 - 3 - 2 | 13 | 11 | 2 | 12 |
| 4 Norður Írland | 8 | 2 - 3 - 3 | 8 | 13 | -5 | 9 |
| 5 Aserbadjan | 9 | 0 - 3 - 6 | 1 | 19 | -18 | 3 |
| 6 Wales | 8 | 0 - 2 - 6 | 5 | 13 | -8 | 2 |

**Bólkur 7**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Serbia-Mont. | 8 | 4 - 4 - 0 | 13 | 1 | 12 | 16 |
| 2 Spania | 8 | 3 - 5 - 0 | 11 | 3 | 8 | 14 |
| 3 Bosnia-Herseg. | 8 | 3 - 4 - 1 | 9 | 8 | 1 | 13 |
| 4 Belgia | 8 | 3 - 2 - 3 | 15 | 8 | 7 | 11 |
| 5 Litava | 8 | 2 - 3 - 3 | 7 | 6 | 1 | 9 |
| 6 San Marino | 8 | 0 - 0 - 8 | 2 | 31 | -29 | 0 |

**Bólkur 8**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Svøríki | 8 | 7 - 0 - 1 | 27 | 2 | 25 | 21 |
| 2 Kroatia | 8 | 6 - 2 - 0 | 20 | 5 | 15 | 20 |
| 3 Ungarn | 8 | 4 - 1 - 3 | 13 | 12 | 1 | 13 |
| 4 Bulgaria | 8 | 3 - 2 - 3 | 14 | 16 | -2 | 11 |
| 5 Ísland | 9 | 1 - 1 - 7 | 13 | 24 | -11 | 4 |
| 6 Malta | 9 | 0 - 2 - 7 | 3 | 31 | -28 | 2 |

Bólkavinnararnir koma beinleiðis til endaspælið. Tveir teir bestu 2'ararnir koma eisini beinleiðis víðari. Seinastu seks 2'ararnir spæla sínamillum play-off dystir um seinastu plássini. Støðan millum 2'ararnar verður uppgjørd eftir, hvussu hesir hava staðið seg móti nummar 1, 3, 4, 5 og 6 í sínum bólki

*Framhald av síðu 21*

urliðaða Spania. Mikukvøldið var landsliðið enn eina ferð úti fyri vónbroti.

Spania átti heimavøll móti Serbia Montenegro, sum fór til hús við einum stigi. Spania var í steðginum frammanfyri 1-0, men úrslitið gjørdist 1-1.

Serbia er tvey stig frammanfyri Spania, sum kennir Bosnia anda seg í nakkan. Bosnia, sum mikukvøldið vann 1-0 í Litava er bara eitt stig aftanfyri Spania. Í tveimum teimum síðstu umførunum sær skráin soleiðis út: Bosnia-San Marino, Litava-Serbia og Belgia-Spania 8. oktober og San Marino-Spania, Serbia-Bosnia og Litava-Beliga 12. oktober.

San Marino legði mikukvøldið rygg til 8-0 tap í Belgia. Hetta var størsta tapið í hesi undankappingini. Pinkutjóðin hevur einki stig fingið, og harvið eru teir uppaftur verri fyri enn Føroyar.

**Bólkur 8**

Í 1974 stóð Svøríki seg framúr væl, tá ið HM endaspælið var í Vesturtýsklandi. Ronnie Hellström, Björn Nordquist, Ove Kindwall, Ove Grahn, Ronnie Eklund og ikki minst Ralf Edström eru saman við øðrum svensk fótbóltsnøvn, sum fleiri framvegis munnu komast við frá hesi kappingini, sum var tann fyrsta, ið tað bar til at síggja video upptøkur frá í Føroyum. Tað var áhugavert, og lítið varð lagt í, at upptøkurnar vóru fleiri dagar gamlar, tá ið tær vórðu sendar úr einum ítróttarhúsi og í annað kring landið!

Mikukvøldið styrkti Svøríki um sína støðu. Teir vunnu 1-0 í Ungarn. Heimaliðið helt tørn, inntil vanliga leiktíðin var farin. Sviar gjørdu, sum teir plaga. Teir góvu ikki skarvin yvir, og tað loysti seg. Zlatan Ibrahimovic sneiddi seg leysan og úr rættuliga spískum í høgru sendi hann bóltin upp í nettakið.

Sigurin smakkaði svium serliga søtur, tá ið næstu kappingarneytarnir hjá Svøríki, Kroatia, bara megnaðu 1-1 á Malta. Harvið tvífaldaði Malta sína stigaúrtøku.

Svøríki skal 8. oktober spæla í Kroatia. 12. oktober skal Svøríki spæla á heimavølli móti Íslandi, sum tapti 3-2 í Bulgaria, hóast teir í steðginum vóru frammanfyri 2-1 og eftir eitt korter høvdu lagt seg framum 2-0. 12. oktober skal Kroatia spæla í Ungarn.




## Ølsøla í Sundalagnum

Tað er óhøgligt hjá fólki í Norðurstreymoy og Eysturoynni at fáa hendur á einum kassa av góðum øli. Fyri at hækka tænuststøðið vil Restorffs Bryggjarí fegin koma í samband við áhugaðan í Sundalagnum sum hevur møguleika at hava depot og ølútsølu

Restorffs BRYGGJARÍ

Att. Johan Mortensen, tel 21 35 10